# Granskarar og vinna hond í hond

**At Føroyar onga fiskivinnugransking hava, er nú søga. Fiskivinnugranskingin, sum nú er sett á kjøl, fer fram í tøttum samstarvi við fiskivinnuna**

GRANSKING
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Aftanfyri fiskivinnugranskingina, sum nú av álvara fer í gongd á fleiri økjum í Føroyum, stendur Fiskimálaráðið. Við hesum kunnu vit ikki longur siga, at Føroya sum fiskivinnutjóð ikki granskar í sínum lívsgrundarlagi, sum fiskivinnan á sjógvi og landi er*

Fiskivinnugransking er ein skipan hjá Fiskimálaráðnum, sum umsitur játtaninar til Fiskivinnuroyndir og Granskingarætlanir. Fiskimálaráðið hevur játtað 3,8 miljónir til gransking í 2004, og játtanin til fiskivinnuroyndir er 7,5 miljónir krónur. Hetta er tann peningur, sum verkætlanin, Fiskivinnugransking, í fyrsta lagi hevur at arbeiða við.

Ein stýrisbólkur, sum er samansettur av fólki úr vinnuni og almennum stovnum við tilknýti til vinnuna, stendur aftanfyri Fiskivinnugranskingina. Stýrisbólkurin skal á hvørjum ári lata landsstýrismanninum í fiskivinnumálum tilmæli um, hvussu peningurin til fiskivinnuroyndir skal nýtast. Bólkurin hevur eisini ábyrgd av sonevndu granskingarkjarnunum mótvegis Fiskimálaráðnum.

Ásmundur Guðjónsson hevur vegna stýringsbólkin verið samskipari av fiskivinnugranskingini, men hann fer nú í annað starv.

### Tríggjar kjarnur

Sum vit nevndu í greinini í mikudagsblaðnum, eru higartil tríggjar sonevndar granskingarkjarnur settar á stovn við trimum granskingarleiðarum; Hóraldi Joensen (biotøkni), Bjarta Thomsen (veiði-og reiðskapstøkni) og Helga Nolsøe (framleiðslutøkni).

Hóraldur hevur skrivstovu á Heilsufrøðiligu Starvsstovuni, meðan Bjarti og Helgi hava sínar skrivstovur á Fiskirannsóknarstovuni. Allir tríggir arbeiða tó burtur av við fiskivinnugransking.

At granskingarkjarnurnar verða hýstar av og byggja á verandi og hóskandi karmar í almennum stovnum, merkir, at komast kann skjótt í gongd við granskingini. Væntandi er eisini, at við hesum fæst eitt mennandi samstarv við vertsstovnin – stovnin, har skrivstovan hjá granskingarleiðaranum er.

Kjarnurnar hava til endamáls at byggja upp vísindaligan førleika, sum er viðkomandi fyri vinnuna. Hetta verður gjørt við at luttaka í og skipa fyri verkætlanum í samstarvi við fiskivinnuna og granskingarstovnar her heima og uttanlands. Á henda hátt skulu kjarnurnar mennast og fáa fleiri granskarar knýttar at sær.

Tað er Fiskimálaráðið, sum setur leiðararnar fyri granskingarkjarnurnar. Til hvørja kjarnu er knýtt ein programnevnd við granskarum og fólki úr vinnuni. Hesi verða saman við granskingarleiðaranum við til at stinga út í kortið, hvat virksemið í kjarnuni skal umfata.

### Programnevndirnar

Programnevndin, sum stendur aftanfyri biotøknina og granskingarleiðaran, Hórald Joensen, er mannað soleiðis: Egil Olsen, M.Sc., Faroe Marine Biotech ltd., Guðny Vang, matvøruverkfrøðingur, Havsbrún, Guðrið Andorsdóttir, Cand. Scient, Føroya Fiskavirking, Kjartan Mohr, Cand. Pharm., Tjaldurs Apotek, Magnus P. Magnussen, PhD, Heilsufrøðiliga Starvsstovan og Sjúrður F. Olsen, Dr. Med., Statens Serum Institut.

Í programnevndini aftanfyri veiði- og reiðskapstøknina við Bjarta Thomsen, sum granskingarleiðara, eru: Søren Havmand, sølustjóri, P/F Vónin, Rúni Berg, stjóri, P/F Teymavirkið, Hans Andreas Joensen, stjóri, P/F Thor, Jan Arge Jacobsen, granskari, Fiskirannsóknarstovan og Holger Hovgaard, granskari, Danmarks Fiskeriundersøgelser.

Helgi Nolsø, sum granskar framleiðslutøkni, hevur hesi fólk í síni programnevnd: Meinhard Jacobsen, stjóri, P/F Føroya Fiskavirking, Árni Joensen, sølustjóri, P/F Vesturvón, Olaf Olsen, stjóri, P/F Beta, Ari Thomasen, stjóri, P/F Kovin, Leon Smith, sivilverkfrøðingur, Fiskirannsóknarstovan, Turid Mørkøre, granskari, Aqua Forsk, Noregi.

Ásmundur Guðjónsson er við í øllum trimum programnevndunum.

### Dømir um gransking

Í faldara, sum Fiskivinnugransking hevur gjørt, eru nøkur dømir um, hvørji granskingarøkini kunnu vera.

Í biotøkni, har talan er um evnafrøðiliga og lívtøkniliga gransking, verður soleiðis sagt:

"Lipidkemi og proteinkemi umfatandi ymsar lipidklassar í fiskagøgnum, flaki og skræðu; fiskaenzym, fiskaprotein, fiskacollagen og fiskagelatin (skræðu-og beingelatin), proteinhydrolysat, fiskarogn, fiskasil (protaminsulfat), hávaúrdráttir, rækjuúrdráttir (chitin, chitosan), krabbaúrdráttir, taraúrdráttir, nutraceutical, medesinsk projektir".

Um veiði-og reiðskapstøkni verður sagt:

"Fiskiveiða skal vera umhvørvisvinarlig og úrveljandi (selektiv). Tí er neyðugt at menna reiðskap, sum órógvar havbotnin minst møguligt og sum ikki skaðar fisk, ið ikki skal veiðast. Eisini mugu fiskiskip mennast eftir somu meginreglu, soleiðis at minst møgulig orka verður brúkt".

At enda verður sagt um møgulig evni at granska innan framleiðslutøkni:

"Eitt øki, sum kjarnin fer at arbeiða við, er hjáframleiðslur. Talan kann bæði verða um hjáframleiðslur frá flakavinnuni á landi og fiskiflotanum. Onnur øki, sum arbeiðast kann við, eru úrtøkuoptimering av flakavinnuni, framleiðsla úr uppisjóvarfiski, royndir við nýggjum maskinum, minking av dryppitapi, tilseting av upploystum proteinum til lidna vøru".

## "Hús" á havbotninum heldur enn fiskiskip

**Aðrar tjóðir fiska við rúsum – ikki bara krabbadjór, men eisini ymisk fiskasløg. Tað er eisini kent, at fiskur savnast um skipsvrak og annað, sum liggur á havsins botni. Spurningurin er so, um tað ber til at "lokka" fisk inn í "hús" á havsins botni og síðan pumpa hann upp**

ALTERNATIV
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Á tíðindafundinum um fiskivinnugranskingina, sum nú er sett sjósett í Føroyum, reisti Bjarti Thomsen, granskingarleiðari, spurningin, hví vit í veruleikanum hava skip at fiska tann fisk, sum skal arbeiðast uppi á landi. Hann vísti fram eina tekning av einum stórum "húsi", sum stóð á havbotninum.

– Hví hava vit ikki heldur nøkur hús standandi á havbotninum, sum vit "lokka" fiskin inn í – við ljósi ella ljóði?

Tað, sum Bjarti við hesum vildi siga, var neyvan, at hann nú fór at mæla til, at øll fiskiskip verða løgd, og at vit í staðin bert skulu hava nøkur fá skip, sum skulu pumpa fiskin upp úr hesum "húsum".

### Hugflogið…

Heldur vildi hann vísa á, at tá ið talan er um gransking, er tað bara hugflogið, sum setir mørkini.

Aðrar tjóðir fiska við rúsum – ikki bara krabbadjór, men eisini ymisk fiskasløg. Tað er eisini kent, at fiskur savnast um skipsvrak og annað, sum liggur á havsins botni.

Eingin ivi er um, at væl hevði borið til at "lokkað" ávís fiskasløg í stórum nøgdum inn í slík "hús", men tað verður neyvan nakrantíð soleiðis, at vit sleppa undan at hava ein fiskiflota.

Kortini ein rættiliga "genialur" tanki, mugu vit siga.





Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

Hans Jákup Hansen:

# Vann kappingina um búmerkið

**Týsdagin 24. februar var samkoma í Leguhúsinum í Nesvík, har nýggja búmerki hjá Kirkjuligu Heimamissiónini var almannakunngjørt og handað formanninum fyri Heimamissiónina Bergi D. Joensen presti**




*Hans Jákup Hansen av Argjum hevur teknað 100-ára búmerkið hjá Heimamissiónini*
*Mynd: Frants Jensen*

Hans Jákup Hansen av Argjum vann kappingina um 100-ára búmerki hjá Heimamissiónini. Tað var eisini hann sum handaði formanninum í Heimamissiónini, Bergi Debes Joensen, búmerkið, og greiddi frá, hvørjir tankar lógu aftanfyri.

Hans Jákup segði m.a. "Tað at tekna eitt búmerki er ikki tann lættasta uppgávan, so tað vóru nógvir tankar, sum komu upp at venda í høvdinum, og leingi vardi, til eg kom til hetta úrslit. Tað fyrsta eg gjørdi, áðrenn eg byrjaði, var at eg bað Gud um vísdóm".

Í búmerkinum ert tveir fiskar og ein krossur. Fiskarnir (ichtys) er teknið í tey fyrstu kristnu nýttu um Krisus. Krossurin er so teknið, ið vit nýta í dag.

Um hugt verður eftir tí grøna litinum, eru trýggir krossar. Her er sjálvandi talan um Golgata. Krossurin í miðuni er tann størsti. Jesus hekk í miðuni.

Hetta ímyndar somuleiðis úti- & heimamissión.

Fiskarnir eru ímynd fyri sjómansmissión og ímynda á sama hátt eitt hjarta. Eitt hjarta fyri missión - á landi sum á sjógvi.

Búmerkið hevur á ein einfaldan hátt tveir litir.

Tann bláligi liturin í fiskunum ímyndar sjógv. Og tann grønligi ímyndar land.

Hans Jákup starvast á Team 85. Sum vinning fekk hann handaðan ein kekk áljóðandi kr. 10.000.



*Bergur D. Joensen, formaður í Heimamissiónini, og Hans Jákup Hansen, vinnari av búmerkjakappingini*
*Mynd: Frants Jensen*

Búmerkjakappingin var skipað sum ein innbjóðað kapping, har heitt var á nøkur fólk at koma við uppskotum, og hevur ein dómsnevnd síðani valt millum tey innkomnu uppskotini.

Umframt Bergur D. Joensen, hevði Heri Tróndheim eisini orðið. Heri er formaður í 100-ára bólkinum hjá Heimamissiónini, og hann greiddi frá, hvørji tiltøk ætlanin er at hava ígjøgnum árið í sambandi við 100 ára haldið. Millum annað er ætlanin at koma við stórari bókaútgávu, at skipa framsýningar, at hava tiltak í Vági, har vøggan hjá Heimamissiónini stóð, at koma út við einum kunnandi bóklingi um Heimamissiónina umframt at gera meir burturúr teimum árligu tiltøkunum hjá Heimamissiónini. Millum annað verður nógv gjørt burturúr Ársmøtinum, sum verður 23. - 25. apríl. Ársmøtið verður í ár bæði í Leguhúsinum í Nesvík og í Ítróttarhøllini á Skála.



*Umleið 35 fólk vóru til staðar í Leguhúsinum í Nesvík. Vit síggja millum onnur Torleif Johannesen, sjómanstrúboðara, Tom Skaale, aðalskrivara í Meimamissiónini, og Hera Tróndheim, formann í 100-ára bólkinum*
*Mynd: Frants Jensen*

### Dagurin

**26. februar. Ingigerð**. Kanska navn á franskari prinsessu, Ingardis, ið vit annars einki vita um. Navnið hevur fingið norrønan form, ið merkir *tann av guðinum Ing varda.*

*Janus Djurhuus føddur hendan dagin í 1881.*

**Tøkk**

Hjartaliga takka vit øllum tykkum,
ið á ymiskan hátt sýndu samkenslu,
tá okkara elskaða kona, mamma og omma

**Susan Skaaning**

andaðist og varð jarðað.

Tøkk fyri blómur, kransar, uppringingar, brøv,
fjarrit og vitjanir.
Somuleiðis takka vit fyri stóra umsorgan
og troystarrík orð.

**Torben, Lone, Signe og Jakob**
**Erik, Christian, Jóhann og Jákup**